# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Mugu taka harðskap í álvara

Er seinasta vikuskifti eitt tekin og ein ávaring um, hvussu náttarlívið fer at vera í Havnini í framtíðini, eiga vit øll at taka hetta í størsta álvara. Harðskapurin, sum var høvuðsyvirskriftin yvir alt seinasta vikuskifti, er eftir øllum at døma vorðin so mikið álvarsligur, at vit mugu meta hann sum ein samfelagsligan trupulleika. Tá ungfólk og eisini tilkomin rætt og slætt verða álopin á opnari gøtu og enda á sjúkrahúsi við løstum, mugu vit øll og ikki bara løgreglan reagera.

Vit eru annars so errin av at kunna fortelja fremmandum, at vit eru heimsins mest friðaliga land at búgva í. Her henda ongin dráp, her er eingin harðskapur. Hendingarnar seinasta vikuskifti siga nakað annað, tó at tær eru ikki nakað heilt nýtt, tí vit eru javnan vitni til harðskap í náttarlívinum. Hann er so eftir øllum at døma við at gerast bæði harðligari og týttari.

Hóast vit hava lyndi til at skjóta ábyrgdina á løgregluna og siga, at tað er hon, sum hevur skyldu til at forða fyri og fyribyrgja, at einstaklingar koma illa fyri, tá teir verða náðileyst álopnir, so er hetta sjálvandi ein felags ábyrgd og skylda. Her spælir eisini uppvøksturin og uppalingin inn. Eru vit sum foreldur nóg góð til at geva okkara ungu gott í beinið! Er skúlin nóg dugnaligur til at læra og leiðbeina børn og ung! Er samfelagið nóg væl innrættað og fyrireikað til at fyribyrgja, at tann ráði og púrasta øri harðskapurin fær gróðrarfesti! Spurningarnir eru nógvir. Vit eiga at seta teir og eisini svara teimum. Hetta gera vit best við einum almennum orðaskifti.

Ein týðandi spurningur er, um okkara løgregla hevur nóg nógvar ressursir ella brúkar tær rætt til at fylgja við, vera upp á forkant og til at tacla harðskapsstøður! Er løgreglan nóg sjónlig! Hví eru løgreglufólk so sjáldan at síggja í Steinatúni út móti morgni, tá hundraðtals ung savnast og nøkur teirra vilja síggja blóð verður spurt. Gott um vit kundu fingið slíkar spurningar fram. Í hvønn mun eru vandafull rúsevni og ikki bara rúsdrekka orsøk til og partur av harðskapinum!

Ætlan okkara í Miðlahúsinum í Vágsbotni er í komandi árið at vera við til at seta sjóneyku og kikara á nøkur av teimum samfelagsmálum, sum leika á og treingja til at verða lýst og umrødd. Her er náttarlívið og harðskapurin eitt sera viðkomandi mál. Tað fara vit so at taka upp til alment orðaskifti í Miðlahúsinum í næstu framtíð.

**Sosialurin**

# Fiskimaðurin og Útvarpið

**JAN HØJGAARD**



Jóhann Mortensen sigur í aftursvari til mín, at teir hvørki stuðla Óla Jacobsen ella Dan R. Petersen. Sum svar til hetta vil eg siga, at um vilji var frá ÚF, so var eg fyri langari tíð síðani sloppin at svara bakbitinum. Men vit fiskimenn eru ikki kløkkir av hesum, tí vit meta, at hetta er ein liður í tí sera ágangandi politikki, sum eitt nú ÚF hevur ført móti okkum fiskimonnum.

Hví sigi eg so? Í áravís hava persónar og samfelagsbólkar lopið á okkum í ÚF, uttan at ein fiskimaður er sloppin at svar aftur. So kann ein spyrja, er hetta trongdskygni ella bevíst frá ÚF? Er hetta góður public service siður? Eitt er so heilt vist, tað er, at fiskimenn føla seg ofta illa viðfarnar í ÚF.

Eg meti enn sum áður, at hetta var eitt tilrættislagt álop á meg persónliga av ÚF og Dan R. Petersen, lærara og varamanni á tingi fyri Javnaðarflokkin. Haldi meg við vissu kunna siga, at Dan R. Petersen hevur tætt tilknýti til ÚF. Tí fekk eg eisini fleiri ávaringar um, at Dan R. Petersen fór at nýta ÚF sum pall í valstríðnum, og at eg fór at blíva útihýstur og verða fyri vanbýti. Hesir spádómar komu til sjóndar, so at siga beinanvegin.

Tað tykist, sum um bæði ÚF og Dan R. Petersen halda okkum fiskimenn verða býttar og gloymskar. Men vit vita, hvat tit standa fyri, og tí fara vit ikki at lurta eftir tykkara propaganda. Tað sær eisini út til, at stórur partur av føroyingum hevur lúrt einvegis tíðundaflutningin hjá ÚF av, tí bara 3,6 % eru væl nøgd við fjølmiðlarnar og har er ÚF tann stóri syndarin.

Vit fiskimenn eru troyttir av at verða hildnir aftur. Vit eru troyttir av at verða lagdir undir bæði líkt og ólíkt, tí ein stórur partur av tí er uppspinn og beinleiðis lygn. Tað vit ynskja, er at fáa ta trygd og løn, vit hava uppiborið fyri tað ómetaliga harða stríði fyri føðilandi, sum hvør fiskimaður útinnur. Tað skal vera nú. Ikki um 3 ár.

# Áheitan á Føroya landsstýri

Hervið gera allar kommunur í Suðuroynni vart við, at vit fegnast um, at Føroya Landsstýri arbeiðir við eini Suðuroyarætlan. Ein slík ætlan kemur í tøkum tíma. Í hesum sambandi fegnast vit eisini um, at Kommunusamskipan Føroya og Føroya kommunufelag so dyggiliga stuðla einum føroyskum eftirskúla í Suðuroynni. Samstundis harmast vit um og mótmæla, at Føroya Landsstýri, sambært portalin tann 26. november, eftir øllum at døma ikki hevur í hyggju at lata eftirskúlan í Hvalba koma á fíggjarlógina fyri 2007. Vit undrast á hesa útsøgn, ikki minst tá havt verður í huga, at eftirskúlin i morgin, týsdagin tann 28. november, skal viðgerast á landsstýrisfundi.

Landsstýrismaðurin í mentamálum sigur, at eftirskúlin er eitt áhugavert og spennandi mál, og at tørvur er á einum føroyskum eftirskúla. Landsstýrismaðurin í mentamálum leggur dent á, at Føroya landsstýri fer at geva eftirskúlanum eina positiva viðgerð. Tess meira undrunarsamt er tað, at mentamálaráðharrin longu nú mest sum ger greitt, at eftirskúlin ikki kemur á fíggjarlógina. Her er okkurt í logikkinum sum haltar, og heita allar kommunur í Suðuroynni staðiliga á Føroya landsstýri um at taka lógvatak saman við Føroya fólki, so at skjótil kann setast á eftirskúlaverkætlanina. Suðuroyggin er í eini serstøðu, og vit hava eina serstaka verkætlan til gleði og gagns fyri føroyskan ungdóm. Ein verkætlan, sum hevur breiða undirtøku millum kommunurnar í Føroyum. Komandi fíggjarlóg er tann seinasta regulera fíggjarlógin, sum verður smíðað áðrenn komandi løgtingsval. Dettur málið niðurfyri nú er stórur vandi fyri, at alt dettur á gólvið. Tískil heita kommununar í Suðuroy á Føroya landsstýri um at mæla Føroya løgtingi til at veita eftirskúlanum í Hvalba tær 7.5 milliónur krónunar, sum nevndin í eftirskúlanum hevur mælt til. Kommunurnar í Suðuroy meta hetta mál at vera ein ítøkiligan og konstruktivan part av eini Suðuroyarætlan.

*Virðingarmest*
*Í Suðuroy, tann 27. november 2006*

**Niclas Hentze**
*Borgmeistari í Sumba*

**Kirstin Strøm Bech**
*Borgmeistari* **í Vági**

**Eli Frederiksen**
*Borgmeistari í Porkeri*

**Delmar Tausen**
*Borgmeistari í Hovi*

**Elin Nielsen**
*Borgmeistari í Fámjin*

**Kristin Michelsen**
*Borgmeistari á Tværoyri*

**Levi Niclasen**
*Borgmeistari í Hvalba*

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Bjarta Joensen bjarta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.